# TILTØK

**»Tíð til Gud«**
verður úti í Pállsstovu sunnukvøldið kl. 21.00. Evni: Internet-porno, seksuell avgudadyrkan? Verið hjartaliga vælkomin.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Eldurin, ið revsar. Kl. 11.00 Gudstænasta, J. V. Danielsen. Kl. 17.00 Sangkórið venur.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti.
Mánadagin kl. 18.30 Hugnaløta teirra ungu.

**Katólska kirkjan**
Hósdag kl. 20.00 bønarkvøld (á enskum) í Mariukirkjuni.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 hámessa í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Hósdagin kl. 20.00 Heimaforbundið.
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18.00 Møti, Sámal Jákup og Elisabeth Joensen leiða og tala. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti hjá Beintu og Suna Haraldsen, Lýðarsvegur 11. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjadagin kl. 20.00 í KFUM: Opið hús fyri ung.
Sunnudagin 2. desember kl. 16.00 í KFUK: Adventsveitsla. Inngangur við Hera Joensen, presti. Kristiliga sangkórið luttekur.

**Aglow, Tórshavn**
Jólafundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30, allar kvinnur og menn eru vælkomin.

**Rhema á Hálsi**
Mikukvøldið kl. 20.00 Húsmøti hjá Anju og Vagn í Geil, Reynstún 28, Argir.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Kids.
Sunnudagin kl. 15.00 Jólafest fyri børnum. Øll eru vælkomin.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, kl. 21.00 Útimøti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta kvinnur.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Petur Steingrund, barnaansing verður.
Mánakvøldið kl. 20.00 Kvinnumøti, kl. 20.00 venur Manskórið.

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í kvøld kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17.00 Landsbøn, kl. 20.00 Jólahugni fyri ung.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Steve Dulwich, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18.00 Kvøldmøti v/ Rúna Rasmussen.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20.00 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Fríggjadagin kl. 19.30: Møti við Egon Kattner. Evnið: Eitt fólk í neyðstøðu: Nehemia 1-2. Chorus syngur.
Leygardagin kl. 19.30: Møti við Egon Kattner. Evnið: Eitt fólk í arbeiði – Nehemia 3-6. Manskórið í Meinigheitshúsinum syngur. Innsavnan.
Sunnudagin kl. 19.00: Møti við Egon Kattner. Evnið: Eitt fólk í andaligari menning – Nehemia 8-9. Argjakórið syngur. Innsavnan. Drekkamuður verður hvørt kvøld. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Hósdagin kl. 19.00 Frítíðararbeiði.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við Jógvan Johannesen.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.

**Kedron, Sørvágur**
Møtirøð við Pól Færø og John í Skemmuni verður í bygdarhúsinum í Miðvági fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnudagin kl. 16.00.

**Filadelfia, Sundalagi**
Sunnudagin kl. 18.30-21.15 Alpha-skeið í Unitum í Kollafirði.

**Missiónsvika í Hósvík**
Vælkomin á missiónsviku í kirkjuni í Hósvík frá 29. nov. til 2. des.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 talar Niels J. Nielsen, fólk úr Vestmanna syngja.
Leygarkvøldið kl. 20.00 talar Regin Høgnesen, Magda og Maybrit syngja.
Sunnukvøldið kl. 19.00 talar Niels Juul Olsen, bólkurin Gittit syngur. Bønarløta verður 1/2 tíma áðrenn møti byrjar. Sunnukvøldið verður innsavnan fyri Heimamissiónina. Aftaná møti verður ein drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Vón fyri framman, við hugna, vitnisburði og sangi, Anfinn Jacobsen luttekur.
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús við Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við ungdómi úr Kelduni, Barnamøti kl. 17.00.
www.keldan.fo

**Aglow, Kvívík**
Jólafundurin verður í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið 1. des. kl. 20.00. Sólrun og Tummas Jacobsen luttaka.

Allar kvinnur og menn eru vælkomin.

**Lívsins Orð**
Fríggjadagin kl. 17.15 Barnamøti. Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Símun P. Jacobsen. Liljurnar møta mánadagin kl. 17.00 og ungdómsbólkurin kl. 20.30.

**Elim, Søldafjørður**
Levi Joensen og aðrir luttaka á fundinum sunnukvøldið 2. des. kl. 18.00 Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Mikumorgunin kl. 6.00 Bøn. Kl. 20.00 H. E. Hammer heldur fyrilestur fyri pør.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 19.00 Alpha skeið, kl. 20.30 Opið hús v/ A. Áargarð.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Jan Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Fríggjakvøldið kl. 21.00 Møti. Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin vegna barnagudstænastu. Sunnukvøldið verður møti kl. 18.00 við Terja og Birgith. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til hús. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður í kvøld kl. 20.00 í Café One Way, Tvøroyri, við luttøku úr Vágum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00 har vit serliga minnast Maureen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið, Vágur**
Ongin sunnudagsskúli vegna kirkjugongd sunnudagin. Kl. 18.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
**Kennir tú føroying í Keypmannahavn**, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
*Reyða Kross Føroya,*
*Bryggjubakki 10,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 311391/261516.*

**Fuglafjørður – Eldrafelagið Borgin**
Hugnaløta verður í Felagslonini í Fuglafirði, hóskvøldið 29. nov. kl. 19.30.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 26. nov.:*
kl. 10.00-10.15: Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 10.15: Fyrireiking til jólasøluna í kjallaranum seinrapartin. **Jólasøla verður í kjallaranum alla vikuna kl. 14.00-17.00. Inngongd frá Grasagarði.**
kl. 14.00-18.00: Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikudagin og fríggjadagin tlf. 316491
*Týsdagin 27. nov.:*
kl. 10.00–12.00: Vit baka til jóla
kl. 10.00–11.00: Sangur - Jóhann R. Jacobsen/Beint Jacobsen. **Øll eru hjartaliga vælkomin.**
kl. 15.00: Hugleiðingar »Mostir mín av Toftanesi«. Petur Martin Petersen.
kl. 14.00-17.00 Jólasøla í kjallaranum
*Mikudagin 28. nov.:*
kl. 10.00–12.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15.00: Túrur
kl. 14.00-17.00: Jólasøla í kjallaranum
*Hósdagin 29. nov.:*
kl. 10.30–11.00: Fimleikur - Sonja Danielsen
kl. 14.00–17.00: Telduprát - Brandur Petersen
kl. 14.00-17.00 Jólasøla í kjallaranum
*Fríggjadagin 30. nov.:*
kl. 10.00–13.00: Matgerð – Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestur.
kl. 16.30 **Kvøldseta – Høvundar við áirnar í Havn.** Leikbólkur úr Havnar Sjónleikarafelag ber fram smásøgur, frásagnir og vísir úr verkum hjá átta rithøvundum í Havn. Vitjan frá Háskúlanum.
kl. 14.00-17.00 Jólasølan í kjallaranum endar.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.
Týskvøld: Er bara fundur ólíka viku nr.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Al-anon**
hevur fundir hvørt mánakvøld kl. 20.30 í gomlu læknahúsunum á Tvøroyri.

**Blái Krossur**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

## GULLBRÚDLEYP

Sunnudagin 2. desember hava hjúnini Maria og Magnus Jacobsen, Glyvrar, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 1. des. saman við børnum og systkjum.

## BRÚDLEYP

Í dag, fríggjadagin kl. 16.00 giftast í Glyvra kirkju Ranvá Adelheid Hansen, Klaksvík og Dann Knudsen, Saltangará. Veitslan verður hildin fyri innbodnum á Hotel Hafnia.

## PRÓGV

Annika Eidesgaard, Eiði, hevur tikið prógv í cand. oecon. agro á Landbo háskúlanum í Keypmannahavn.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
*tlf. 21 04 95.*
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**MBF**
*Íslandsvegur 10C*
*100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 · Fax 310813*
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Sinnisbati**
*Íslandsvegur 10 C,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 322544 · Fax 310813*
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00.
Form. tlf. 312045
næstf. tlf. 310333.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40*
*3. hædd (ovast).*
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 10-14. Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
*Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
*Postsmoga 1063*
*110 Tórshavn.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á
e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.



**FILMSTEIGURIN**

# The Animal



Lívið hjá Marvin er við at venda heilt upp og niður. Hann er við at broytast til ein djóragarð. Skjótt er hann líka sterkur sum ein leyva, líka fimur sum ein apa, og kenslurnar fyri smáu geitalombunum eru illgrunasamar.

Áðrenn alt er við at ganga galið, arbeiðir hann á løgregluskrivstovuni, men dreymur hansara er ein dag at gerast løgreglumaður. Einasta, ið forðar honum, er likamliga royndin, hann má ígjøgnum, men sum er ov nógv fyri bleyta Marvin. Eitt kvøldið hann er einsamallur á løgreglustøðini, fer ein tjóvaríávaring í gongd, og tá ið eingin løgreglumaður er til arbeiðis, fer Marvin sjálvur á staðið. Men tíverri eru tjóvarnir dugnaligari enn neyðars Marvin. Bilur hansara verður vrak og sjálvur er hann við at fara úr hesum heimi…

Ørkymlaður og illa løstaður følir hann, hvussu hann varisliga verður drigin úr vrakinum. Tá er hann ikki greiður yvir, at hóast hann yvirlivir ólukkuna, verður hon byrjanin til eina røð av løgnum hendingum, sum væl at merkja bjarga lívi hansara, men rokningin kemur aftaná. . .



Bjargingarmaður hansara er eingin annar enn úrmælingurin Dr. Wilder, sum hevur loyst genetisku gátuna. Í sínum loyniliga, væl fjalda laboratorium setir hann kroppin á Marvin saman við eykalutum frá ymiskum djórum, eitt nú við stubbum frá eini sirkusleyvu og annað frá einum væl uppaldum hundi.

Tá ið Marvin kemur aftur til arbeiðis, minnist hann einki til bjargingarroyndina ella skurðviðgerðirnar, sum Dr. Wilder hevur gjørt. At hann hevur fingið ein heilt serligan luktisans og stórar yvirarmar, sigur hann, koma av serliga heilsumatinum, hann etur.

At síggja til, sær hann nærum vanligur út, men innan í honum stríðast eitt ótal av djóragenum, sum eingin kennir avleiðingarnar av.



Eftir at hann snoddar seg fram til ein narkosmuglara á flogvøllinum, verður Marvin heiðraður sum hetja og verður beinanvegin løgreglumaður. Men tað gongur ikki long tíð, fyrr enn starvsfelagir hansara fáa illgruna um, at alt ikki ruggar rætt. . . Og nú eru góð ráð dýr!

Rob Schneider hevur høvuðsleiklutin. Luke Greenfield hevur leikstjórnað, og Tom Brady hevur skrivað handritið til filmin.

Filmurin verður frumsýndur í Havnar Bio í kvøld.





**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 30.11. | kl. $19^{00}$ | Fríggjadagin | 30.11. | kl. $21^{00}$ |
| Fríggjadagin | 30.11. | kl. $23^{30}$ | Leygardagin | 01.12. | kl. $19^{00}$ |
| Leygardagin | 01.12. | kl. $21^{00}$ | Leygardagin | 01.12. | kl. $23^{30}$ |
| Sunnudagin | 02.12. | kl. $20^{00}$ | Sunnudagin | 02.12. | kl. $22^{30}$ |

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
Tlf. 3119 56




**Aldursmark: 7 ár. – Børn undir 10 ár sleppa tó bert inn um tey fylgjast við vaksnum**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 30.11. | kl. $17^{00}$ | Fríggjadagin | 30.11. | kl. $20^{15}$ |
| Leygardagin | 01.12. | kl. $17^{00}$ | Leygardagin | 01.12. | kl. $20^{15}$ |
| Sunnudagin | 02.12. | kl. $16^{00}$ | Sunnudagin | 02.12. | kl. $19^{15}$ |

**Billettprísur: 65.- kr. –**




Fríggjadagin 30.11. kl. $16^{30}$ Leygardagin 01.12. kl. $16^{30}$
Sunnudagin 02.12. kl. $18^{00}$




Fríggjadagin 30.11. kl. $23^{00}$ Leygardagin 01.12. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 02.12. kl. $22^{00}$

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning**
Mikudagin **19.12.** kl. $19^{00}$ Mikudagin **19.12.** kl. $22^{15}$
**Billettprísur: 70.- kr. – Forsølan er byrjað**